# SF fyri stórum falli

Sosialistiski Fólkaflokkurin í Danmark hevur havt sera stóra framgongd í seinastuni, men nú vísir ein nýggj meiningakanning, at flokkurin missir veljarar aftur. Var val til Fólkatingið nú, hevði SF fingið 16,6 prosent. Tað er væl minni enn tey 20,8 prosentini, sum flokkurin fekk í einari kanning í síðsta mánað. Tann nýggja kanningin vísir eisini, at Ny Alliance hevði mist sínar tinglimir, men at Eindarlistin hevði varðveitt sínar fýra.



# Stjórin skal vera kvinna

Í hesum døgum eru 100 ár, síðani danskar kvinnur fingu atkvøðurætt til kommunuval, men yvirhøvur er semja um, at tað hevur verið striltið hjá kvinnunum at koma sær fram á arbeiðsmarknaðinum hesa øldina. Ikki tí, sambært einari kanning hjá Epinion halda mong, at fleiri kvinnur eiga at manna stjórastørv í vinnulívinum. Kanningin vísir, at serliga tey yngru vilja hava kvinnu til stjóra. Tað siga 69 prosent av teimum, sum eru millum 18 og 34.





*Tá øll fýra byggistigini eru liðug, fevnir nýggi skúlin við Løgmannabreyt um eitt øki á 6000 fermetrar*

# Kollveltandi skúli í Hoyvík

**Nýggi skúlin við Løgmannabreyt í Hoyvík er ikki bara størsta og dýrasta skúlabygging í Føroyum nakrantíð. Talan er eisini um eina kollvelting innan føroyskan skúlaskap**

FÓLKASKÚLI
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens K. Vang*



*Ein aðalhugsan við nýggja skúlanum er, at hann skal kunna uppfylla øll nútímans pedagogisk krøv, segði Árni Winther, arkitektur, á tíðindafundi í morgun*

Tá nýggi skúlin við Løgmannabreyt í Hoyvík verður tikin í nýtslu eftir summarfrítíðina, er talan ikki bert um fyrsta byggistig í størstu og dýrastu skúlabygging í Føroyum nakrantíð. Eisini innan føroyskan skúlaskap er skúlin eitt sindur av eini kollvelting, har pedagogiska hugtakið "við støði í einstaka næminginum" fær ein heilt ítøkiligan týdning. Í staðin fyri siðbundnar floksstovur, har flokkurin situr samlaður allan dagin, verður tað tørvurin hjá tí einstaka næminginum, sum ger av, hvar hann skal vera.

### Høli í tráð við tørv

Á tíðindafundi í morgun greiddi Árni Winther, arkitektur frá, at aðalhugsanin við bygninginum er, at hann skal kunna uppfylla øll nútímans pedagogisk krøv, umframt at hann lætt skal kunna lagast til framtíðar broytingar.

Í staðin fyri vanligar skúlastovur, fær hvør árgangur sítt egna øki, sonevnd Heimrustir, við hølum, ið verða tikin í nýtslu í tráð við tørvin hjá einstaku næmingunum. Hølini eru skipað soleiðis, at ymsir frálærumøguleikar lættliga kunnu setast í verk, alt eftir, um brúk er fyri bólkaarbeiði, samrøðum ella floksfrálæru.

Tá fyrsta byggistig verður tikið í nýtslu eftir summarfrítíðina, verður byrjað við 1. til 3 flokki. Tá øll fýra byggistigini eru tikin í nýtslu, rúmar skúlin út við 500 næmingum frá 1. til 9. flokk, umframt frítíðarskúla til 1. og 2. flokk. Eisini kemur skúlatannlækni at hava høli í skúlanum.

### Atlit til grannalag

Umframt krøvini til sjálvan skúlan hava arkitektarnir eisini tikið atlit til grannalagið kring skúlan. Hóast út við 5000 fólk búgva í økinum, er heldur tunnligt við frítíðartilboðum. Tí er ætlanin, at dupulta fimleikarhøllin, høli til framførslur og onnur felagshøli í skúlanum skulu kunna brúkast til annað enn skúlavirksemi.

Seinni er eisini ætlanin at byggja nýggjan fótbóltsvøll við síðuna av skúlanum.

Samlaði kostnaðurin fyri skúlan liggur millum 150 og 170 milliónir krónir.

# Nýgg Afrodite í miðbýnum

**Við nýggjum hølum í miðbýnum er Salong Afrodite vorðin munandi meir sjónlig í býarmyndini í Klaksvík**

KLAKSVÍK
*Anna V. Ellingsgaard*
*Myndir: Høgni Thomsen*



*Tær tríggjar Jórun Mc.Leod, Jóna Eydnugarð og Joan Baldvinsson reka nú nýggju Salong Afrodite í miðbýnum í Klaksvík*

Tað var ein liður í at hækka tænastustøðið enn meira, tá Salong Afrodite leygardagin lat upp í nýggjum hølum í miðbýnum í Klaksvík.

Tað siga tær tríggjar, Joan Baldvinsson, Jóna Eydnugarð og Jórun Mc. Leod Jacobsen, sum í felag nú reka frisørstovuna Afrodite.

### Meir sjónlig

Við nýggju adressuni er Salong Afrodite vorðin munandi meir sjónlig, enn frisørstovan var á Bumshamarsvegi, har hon helt til framman undan.

Eigararnir dylja heldur ikki yvir, at ein av orsøkunum til, at tær nú flyta, er at tað verður lættari hjá fólki at detta inn á gólvið.

Tær vísa á, at í dag er ikki longur nokk at duga sítt handverk sum frisørur. Tú mást eisini hugsa um at verða sjónlig og vera har, ið fólk eru og koma.

Tí hava tær valt at flyta heim á Klaksvíksveg, har stórur partur av handilslívinum heldur til, umframt at parkeringsviðurskiftini eru rættiliga góð.

Ungu dámurnar í Afrodite leggja seg framvegis eftir at geva viðskiftafólkunum eina all-round vakurleikaviðgerð innan bæði hár, makeup og litir.

Salongin heldur nú til á ovaru hæddini á Klaksvíksvegi 58.